FYLGISKJAL 6

LM-065/2025

Alda Joensen

Fra: Leikarafelag Føroya <leikarafelag@leikarafelag.fo>
Sendt: 3. november 2025 18:09
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Re: 25/14176 - Til HOYRINGAR - Uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.
Vedhæftede filer: Svarskriv Leikarafelag Føroya 25_14176 - Til HOYRINGAR - Uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m..pdf

Góðu tit í AMMR

Viðfest er

Hoyringssvar til 25/14176 - Til HOYRINGAR - Uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.

Leikarafelag Føroya
Lützenstrød 4
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
www.leikarafelag.fo
(website down at the moment, will soon be back in a brandnew design:-)

Den man. 6. okt. 2025 kl. 11.03 skrev Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>:

> Hey
>
> Nú viðfest uppskot.
>
> Haldi okkum til góðar
>
> Vinarliga / *Kind regards*
>
> **ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ**
> Ministry of Social Affairs and Culture
>
> Eirargarður 2 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
> Office: +298 304000 / ammr@ammr.fo / www.ammr.fo

Fra: Almanna- og mentamálaráðið
Sendt: 3. oktober 2025 14:15
Til: Tjóðpallur INFOboks <info@tjodpallur.fo>; 'leikarafela@leikarafelag.fo' <leikarafela@leikarafelag.fo>; 'mentan@mentanargrunnur.fo' <mentan@mentanargrunnur.fo>; 'Listafólkasamband Føroya' <lisa@lisa.fo>; 'maf@maf.fo' <maf@maf.fo>; 'ronn@fuglafjordur.fo' <ronn@fuglafjordur.fo>; 'Annfinnur Heinesen' <annfinnur@varpid.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; 'uvmr@uvmr.fo' <uvmr@uvmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Barna- og útbúgvingarmálaráðið <bumr@bumr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; 'hmr@hmr.fo' <hmr@hmr.fo>; 'lmr@lmr.fo' <lmr@lmr.fo>; 'lms@lmr.fo' <lms@lmr.fo>
Cc: eydun@ammr.fo; eydun@ammr.fo; Torkil Vestergaard Rasmussen <TorkilR@ammr.fo>; Alda Joensen <AldaJ@ammr.fo>
Emne: 25/14176 - Til HOYRINGAR - Uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.

Góðan dag,

Við hesum verður uppskot til broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m. sent tykkum til ummælis.

Skotið verður upp at umskipa leistin fyri stuðli til yrkisleiklist soleiðis, at tað frameftir verður Mentanargrunnur Landsins, sum eftir tilmæli frá nøkrum sakkønum ráðgevum, fer at taka avgerðir um stuðul til yrkisleiklist. Mentanargrunnurin umsitur frammanundan eina røð av stuðulsskipanum. Stuðulin til yrkisleiklist skal hava sína egnu stuðulsjáttan á fíggjarlógini, soleiðis at skilnaður er millum hesa játtan og aðrar játtanir, ið Mentanargrunnurin umsitur. Sami leistur er gjørdur fyri filmsstuðulin, ið upp til 31. des. 2024 lá beinleiðis undir landsstýrisfólkinum.

Endamálið við broytingini er at tryggja armslongd frá politisku skipanini, sum eisini stendur í samgonguskjalinum.

Skotið verður eisini upp at broyta heitið "leiklist" til "palllist", sum verður mett at vera eitt breiðari hugtak, ið fevnir um øll viðkomandi sløg av list at pallseta.

Við uppskotinum fær Leiklistaráðið hjá Tjóðpallinum, frameftir nevnt Palllistaráðið, varafólk, og Palllistaráðið fær samstundis betri umstøður at hugsavna seg um virksemið á Tjóðpallinum saman við stjóranum.

Møguligar viðmerkingar verða at senda til ammr@ammr.fo **í seinasta lagi mánadagin 3. november 2025 kl. 12:00**.

Vinarliga / *Kind regards*

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Culture

Eirargarður 2 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 304000 / ammr@ammr.fo / www.ammr.fo

LM-065/2025

Leikarafelag Føroya

Tórshavn 03.11.2025

Til AMMR

Viðmerkingar frá Leikarafelag Føroya til uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m.

Takk fyri hesa roynd at bøta um karmarnar um palllistina. Tað frøast vit um, men mugu tíverri ásanna, at vit ikki uttan dvøl kunnu taka undir við uppskotinum.

Teaturlóggávan og palllistapolitikkur Føroya

Verandi *Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.* er føroyska systurlógin til tað sum aðrastaðni eitur ein teaturlóg.

Hesar teaturlógir spegla listapolitikkin fyri palllistina. Verandi lóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. speglar tann leiklistaliga politikkin, ið fyrisiting, politikarar, áhuga- og yrkisøkið vóru komin ásamt um, tá ið lógin varð viðtikin í 2003.

Lógin og teaturpolitikkurin tornar fram um at mennast

Við hesum uppskotinum verður tann føroyska lógin um palllist ("teaterlov") gjørd minni. Hon tornar. Ístaðin átti hon at verið ment til at koma upp á tað støðið, ið ein tílík hevur, eitt nú í Danmark, ið hevur eina teaturlóg, sum fyllir upp nógv av grundleggjandi krøvunum til eitt vælvirkandi teaturøki. Eisini í Norra er lóggáva, ið er verd at lata seg íblása av. Soleiðis sum vit ynskja, at eisini teaturøkið í Føroyum skal mennast.

Okkara ynski er, at fakøkið verður tikið í álvara og at ein teaturlóg við tilhoyrandi dagførdum skipanum í tráð við ein dagførdan teaturpolitikk verður gjørd í góðum samstarvi við føroysku yrkisteaturfólkini.

Hvat skal lógarbroytingin loysa?

Í frágreiðingini, sum AMMR innleiðir uppskotið um lógarbroytingina við, verður sagt at "Endamálið við broytingini er at tryggja armslongd frá politisku skipanini, sum eisini stendur í samgonguskjalinum...". Víðari verður sagt, at

"...Við uppskotinum fær Leiklistaráðið hjá Tjóðpallinum, frameftir nevnt Palllistaráðið, varafólk, og Palllistaráðið fær samstundis betri umstøður at hugsavna seg um virksemið á Tjóðpallinum saman við stjóranum.

Altso endamálið við lógarbroytingini er, sum skilst:

1. Navnaskifti
2. At tryggja armslongd
3. Funksjónin hjá Leiklistaráðnum - stýrið fyri Tjóðpallin.

1. Navnaskifti

Punkt 1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkispalllist og áhugapalllist"

Hvat er yrkisleiklist og hvat er yrkispalllist?

Hvat er yrkisleiklist og hvat er yrkispalllist? Tað er neyðugt at allýsa fakligu hugtøkini og taka í álvara avleiðingarnar av broytingini. Vit taka undir við at broyta frá yrkisleiklist til yrkispalllist, **undir tí fortreyt at tað verður gjørd ein allýsing av, hvat hetta umfatar og at vit kunnu taka undir við hesi allýsing.**

Hartil er neyðugt at skipa játtanina eftir einum leisti, ið samsvarar við nýggja heiti.

Áhugapalllist er ikki eitt fakligt hugtak

Skotið verður upp navnaskifti til "Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkispalllist og áhugapalllist". Vit fakfólk vilja gera vart við at "áhugapalllist" ikki er eitt

fakligt hugtak, ið vit kenna til. Vit kenna áhugaleik, áhugadans, áhugasangleik o.a. Vit kenna áhugaleikari og yrkisleikari. Áhugadansari og yrkisdansari.

Okkara fakliga sannføring er, at tað ber til at arbeiða lista***liga*** við áhugaleiki, meðan áhugaleikur ikki kann verða bólkaður undir list.

Vit mæla til at heitið í lógini verður broytt soleiðis at greiðari skilmarkan er millum yrkislist og áhugaligt virksemi.

Tískil mæla vit frá at føra hetta orðið "áhugapalllist" inn í lóggávuna.

"V.m" og samanbrotið á yrkisøkinum

"V.m" í lógarheitinum er strikað. V.m umfatar tann partin, ið vit fakfólk mest hava eftirspurt. V.m. snýr seg m.a. um at varða av øllum økinum og ráðgeva landsstýrisfólkinum - eisini um fríyrkisøkið. Júst vegna tað, at skiftandi Leiklistaráð ikki hava røkt hendan partin, er økið brotið saman.

Tær skyldur, ið hoyra til v.m. hava ikki verið røktar. Vit trúgva ikki, at tað fer at gera tað betur, at strika v.m. í heitinum og harvið málsliga leggja minni dent á hendan partin.

Vit hava veruliga tørv á einum ráðið, sum fakliga skipar samstarvið á økinum. Einum ráðið, sum ynskir at lyfta og menna alt økið. Einum ráðið, sum loyalt og við virðing fyri øllum økinum ráðgevur landsstýrisfólkinum í øllum lutum á palllistaøkinum.

Tað má tryggjast, at uppgávan verður lyft og at fólk við innliti í palllist eru tey, sum gera hetta í góðum samskifti og í samstarvi við yrkis- og áhugafólkini.

Tískil er **v.m.** av alstórum týdningi í lóggávuni og eigur ikki at verða strika úr heitinum uttan so at lógin heilt skiftir heiti og fær eitt navn, ið er meira yvirskipað eins og heitið Teaterlov er yvirskipað. Í Føroyum kundi tað verði: Lóg um palllist ella Teaturlógin.

2. At tryggja armslongd

Punkt 17. Og 18:

§ 11 verður orðað soleiðis:

"Mentanargrunnur Landsins tekur

avgerð um stuðul til yrkispalllist, sbr.

stk. 2.

Stk. 2. At meta um umsóknir og at gera

tilmæli til Mentanargrunn Landsins setir Mentanargrunnur Landsins tveir ráðgevar og tvey varafólk eftir tilmæli frá eini faknevnd fyri palllist, sbr. § 11a.

Stk. 3. Ráðgevarnir og varafólk teirra skulu hava formligar førleikar og viðkomandi fakligar royndir til tess at meta um stuðulsumsóknir, og ráðgevarnir og varafólk teirra mugu ikki hava fíggjarlig ella persónlig áhugamál í umsóknunum. Varafólk kemur í staðin, um ráðgevi er ógegnigur ella fær forfall.

Stk. 4. Ráðgevar kunnu í mesta lagi sita í 2 ár á rað. Eftir 12 mánaðir skal ein nýggjur ráðgevi setast, soleiðis at somu ráðgevar í mesta lagi arbeiða saman í 12 mánaðir.

Stk. 5. Stuðul kann latast feløgum, bólkum og einstaklingum, ið reka yrkispalllistaligt virksemi, til leikrit, tónasmíð, leikstjórnan, framførslur, keyp av útbúnaði, verkætlanir, skeið, keyp av sakkønari hjálp og annað palllistavirksemi.

Talan er um eina broyting, sum innførir bæði eina faknevnd og ráðgevar. Í verandi uppskotið skulu limirnir í faknevndin ikki fylla upp nøkur førleikakrøv og setan hevur onga tíðaravmarking.

Tað er, snøgt sagt, ikki í lagi.

Tað stendur einki um, hví skotið verður upp at velja eina faknevnd uttan fakligar førleikar, sum so skal velja ráðgevar við fakligum førleikum. Í verandi uppskotið er tað faknevndin, altso hon, ið ikki hevur førleikakrøv, ið hevur óavmarkaða setu, meðan ráðgevararnir sita tvey ár.

Ein faknevnd má hava grundleggjandi faklig krøv skilgreinaði. Limirnir í faknevndini eiga **í minsta lagi at møta somu førleikakrøvum, sum ráðgevarnir.**

Um ikki førleikakrav verður sett til faknevndina **so kann talan ikki vera um armslongd**, ið er tryggjað av fakligheit og **endamálið við lógarbroytingini sostatt ikki uppfylt.**

Punkt 18.

18. Í § 11, stk. 5 verður heitið

"leiklistavirksemi" broytt til:

"palllistavirksemi".

Tað má skilgreinast, hvat yrkispalllist umfatar.

Hvørji er krøvini til sjangru?

Hvørji eru krøvini til førleikarnar hjá teimum, ið luttaka í verkætlanunum, ið fáa stuðul?

Punkt 19.

Aftan á § 11 verður sett:

"Faknevnd fyri palllist

§ 11 a. Mentanargrunnur Landsins

setir faknevndina fyri palllist eftir

tilmæli frá Leikarafelag Føroya og

Palllistafelag Føroya, ið mæla til hvør

sín lim í faknevndina fyri palllist.

Stk. 2. Faknevndin fyri palllist

eftirmetir hvørt umsóknarumfar saman

við ráðgevunum og Mentanargrunni

Landsins."

AMMR vil geva einum felagið, sum eitur Pallistafelagið rættin til at tilmæla 50 pct av faknevndini, ið eingi førleikakrøv eru til. Ein fortreyt fyri armslongd er fakligheit. Palllistafelagið hevur ikki skjalprógvað, at tað umboðar ein munandi skara av fólkum, sum antin eru yrkislærd við viðurkendari hægri útbúgving innan palllistagreinirnar ella hava átta árs samsvarandi royndir.

Tað er Leikarafelag Føroya, sum hevur samráðingarrættin fyri øll leikhústarvsfólk. Fyri at hava samráðingarrættin, **so skal eitt felag hava í minsta lagi tveir triðingar av yrkisfólkunum í sínum limaskara.** Tað hevur Leikarafelag Føroya. Tí er tað ikki rætt at lata 50 pct av tilmælisrættinum til nakað annað felag. Leikarafelag Føroya er felagið fyri tey yrkisfólk og tað yrkisliga virksemi, sum hendan lógin umfatar.

Politiska skipanin eigur ikki at blanda seg upp í hetta og av sínum eintingum útvelja einstøk feløg fyri at geva teimum somu rættindi sum taðfelagið. Ið hevur bróðurpartin av fakfólkunum í sínum limaskaðra, nevniliga Leikarafelag Føroya.

Palllistafelagið hevur ikki skjalprógva ein limaskara av fakfólkum. At geva 50 pct av tilmælisrættinum er sostatt **ikki í tráð við armslongdarprinsippið.**

Sostatt livur heldur ikki hendan broyting upp til endmálið um at styrkja armslongdina.

Kærumøguleiki

Listafólk skulu verjast av armslongd, tí tað tíverri viðhvørt er neyðugt. Tí er umráðandi við einum kærumøguleika. Tað er á ongan hátt skilagott at læsa listafólk inni handan eitt armslongdarprinsip, ið eingin kann røkka. Tá er vandi fyri at armslongdin virkar ímóti listafólkunum, og ikki sum verja av teimum. Hetta eigur AMMR at taka í størsta álvara og gera eina skipan, sum tryggjar okkum soleiðis, at vit fáa kært.

Vit mæla til, at ein orðing verður gjørd í lógaruppskotinum viðvíkjandi kærumøguleika.

Hvussu ber tað til at MáF sjálvi hava ræðið á síni játtan

Í hesi somu lóg er stuðulin til Meginfelag áhgaleikara Føroya, MáF. Tað er MáF sum umsitur stuðulin til áhugaleik.

Hvør er grundgevingin fyri, at ikki eisini hesin stuðul skal flytast yvir í Mentanargrunn Landsins?

3. Funksjónin hjá Leiklistaráðnum - stýrið fyri Tjóðpallin.

Triðja endamálið við lógarbroytingini verður, sum sagt grundgivið soleiðis:

"...Við uppskotinum fær Leiklistaráðið hjá Tjóðpallinum, frameftir nevnt Palllistaráðið, varafólk, og Palllistaráðið fær samstundis betri umstøður at hugsavna seg um virksemið á Tjóðpallinum saman við stjóranum."

Varafólk

Serliga undir viðgerðunum av stuðulsumsóknum hevur verið ein tørvur á, at limirnir í Leiklistaráðnum hava havt eitt varafólk.

Vit taka undir við at limirnir í ráðnum hava varafólk.

Hugsavnan

Vit undra okkum yvir tað arbeiði hjá Leiklistaráðnum, sum við hesi lógarbroyting fellur burtur skal kunna gera tað munandi betri hjá Leiklistaráðnum at hugsavna seg. Arbeiðið, ið fellur burtur, er at viðgera 8-10 árligar umsóknir um verkætlnarstuðul. Annað er ikki broytt.

Vit halda tí ikki at hetta er eitt lógaruppskot, sum snýr seg um uppgávuna hjá Leiklistaráðnum, sum stýri fyri Tjóðpall Føroya og mæla frá hesi ítalusetan.

Armslongd

Um verandi skipan ikki tryggjar armslongd á fríyrkisøkinum, so ger hon tað heldur ikki í mun til listaliga stovnin Tjóðpall Føroya. Stovnurin hevur nógv fleiri ressoursir enn fríyrkisøkið. Her eigur armslongd at verða raðfest og tryggjað av fakligheit í stýrinum.

AMMR eigur, sum eitt minsta krav, at seta limir í Leiklistaráðið, sum liva upp til kravið í kunngerðini, nevniliga innlit í palllist. Allarhelst eiga stýrislimir at hava viðkomandi fakútbúgving bæði innan funktións- og leiðsluleiklut á leikhúsi. Lat okkum í hesum sama viðfangi gera greitt, at tað at hava sitið ófaklærdur og uttan innlit í palllist í leiklistaráðnum eina setu, er ikki haldgóð faklig grundgeving.

Hvør tryggjar nær starvsfólkaumboðið fer frá?

Starvsfólkaumboðið skal, sum nú er, bert sita í tvey ár. Allíkavæl er tað hent ferð eftir ferð, at hetta umboð hevur sitið ov leingi. Tankin um at starvsfólkaumboðið einans skuldi sita í tvey ár, er tann, at Tjóðpallurin í flestu førum hevur fríyrkisfólk í starvi, so tað eru sum oftast skiftandi starvsfólk í teim skiftandi verkætlanunum/leikverkunum hjá Tjóðpallinum. Tískil var tankin um tvey ára umboðanina hjá starvsfólkunum tann, at hetta umboð skal verða meira fleksibult enn hinir limirnir, sum sita í 3 ár. Nettupp fyri at tryggja starvsfólkini, tað verið seg listarliga leiðslutoymið, útinnandi listafólkini og tekniska hópin. Hvør tryggjar at hetta verður yvirhildið? Tað eigur at verða púra greitt í tekstinum.

Vit vilja nýta høvið til at gera vart við at starvsfólkaumboðið eigur at verða eitt fólk, sum arbeiður palllistaliga og hvørki eitt fyrisitingar- ella eitt ástøðiligt starvsfólk. Tað átti at verið sjálvsagt. Men síðani mótmælini frá yrkisfólkunum er høgra hond hjá stjóranum tvær reisur vald í stýrið.

Tað krevur fakligan førleika innan palllist at verða stýrislimur í Leiklistaráðnum. Aftur og aftur siga fakfólkini hetta. Aftur og aftur verða sett stýri fyri leiklistina, har tað ikki eru fakfólk og har forfólkið og aðrir stýrislimir ikki hava innlit í palllist. At flyta viðgerðina av umsóknum um stuðul til fríyrkis verkætlanir yvir í Mentanargrunnin, loysir ikki hetta.

Samanumtikið

- Vit fegnast um, at tað er politiskur vilji til at loysa okkara trupulleikar, og vit ynskja at arbeiðið við Lóg um Tjóðpall Føroya, stuðul til yrkisleiklist v.m. verður gjørt ordiligt og frá botni av í góðum samstarvi við okkum, sum hava útbúgvið okkum og brúka okkara arbeiðslív uppá føroyskan yrkissjónleik.

- Hartil er neyðugt at skipa játtanina eftir einum leisti, ið samsvarar við nýggja heitið Palllist. Eitt nú við at gera serstakar puljur til ymisku palllistagreinarnar, so sum stuðul til yrkissjónleik, stuðul til musikkdramatik, stuðul til dans. Hesar skulu skilgreinast og hava sína egnu játtan uttan at taka úr somu núverandi pulju.

- Tað er ógreitt, hví talan er um bæði at velja eina faknevnd uttan fakligar førleikar og ráðgevar við fakligum førleikum. Í verandi uppskotið er tað faknevndin, also hon ið ikki hevur førleikakrøv, ið ikki hevur avmarkaða setu, sum setur ráðgevarnar.

Um ikki førleikakrav verður sett til faknevndina so kann talan ikki vera um armslongd, ið er tryggjað av fakligheit.

- Ein tílík lóg eigur at umfata fleiri sløg av stuðulskipanum og stuðul, sum skilgreinar ymsu palllistaøkjunum hvør sær.
  https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2009/780

- Eins og hon eigur at taka hædd fyri at tryggjað, at yrkisleiklist kann koma út um alt landið, at tað er møguligt at geva rabat til ungdómsatgongumerki o.a.

- Av allarstórsta týdningi: Lóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkisleiklist v.m., okkara teaturlóg og kunngerðir hennara skulu haldast. Tað merkir, at stýrið fyri Tjóðpall Føroya má og skal hava eitt nøktandi palllistafakligt støði.

- Til lógina hoyra, sum kunnugt, kunngerðir - m.a. ein kunngerð um Leiklistaráðið.

Kunngerðin um Leiklistaráðið hevur heldur ikki verið fylgd. Í kunngerðini stendur, at tey sum sita í Leiklistaráðnum skulu hava innlit í palllist. Hetta hevur ikki verið førið. Avleiðingarnar av hesum hava yrkisfólkini merkt í sínum gerandisdegi, og tað hava tey í yvir tíggju ár eisini gjørt vart við. Leikarafelag Føroya gjørdi alment vart við hetta í 2015. Einki varð gjørt. Trupulleikarnir vuksu og í 2020 varð stovnað ein fylking, hvørs einasta endamál var at gera vart við trupulleikarnar. Fyrst við mótmæli og síðani við boykotti av Tjóðpalli Føroya.

Yrkisleiklistaøkið hevur sagt frá um álvarsligar fakligar trupulleikar. Ofta hava vit verið møtt við ikki at verða tikin í álvara. Hesin fyri okkum yrkisfólk avgerandi spurningur um Leiklistaráðið, verður kveistraður burtur og kallaður klandur.

- Vit í Leikarafelag Føroya mugu ásanna, nú árini eru liðin, at listapolitiska ætlanin í lógini ikki er fylgd.
- Politiski mynduleikin eigur at halda armslongd til, hvør ið tað er, ið kann umboða fakøkið í lógartekstum og ikki av sínum eintingum taka fram feløg, ið ikki hava skjalprógva sín rætt. Politiski mynduleikin eigur at viðurkenna fakligheitina á økinum og ikki velja út feløg, sum ikki hava skjalprógvað ein limaskara við nøktandi førleikum.

- Øll fakfólk við nøktandi førleikum kunnu fáa A-limaskap í Leikarafelag Føroya. Tey sum ikki hava lokið útbúgving ella tænt upp átta ár kunnu fáa B (næminga) limaskap. Tað ber til at vera limur bæði í Palllistafelagnum og Leikarafelag Føroya, **men tað kann bara verða Leikarafelag Føroya, sum umboðar yrkisligu fakligheitina í Føroyum í tílíkum formligum høpi**. Leggjast kann afturat, at tað er eisni bert Leikarafelag Føroya, ið er viðurkent av yrkisfeløgunum í grannalondunum.

Sum sagt, gleðast vit um hesa royndina at loysa hetta, men mega tíverri ásanna at alt ov nógvir veikleikar eru í hesum og at tað tískil ikki livur upp til endmálið. Við hesum lógartekstinum er fakligheitin ikki tryggjað og armslongdin sostatt ikki styrkt. Tvørturímóti, um hetta uppskotið fer ígjøgnum, so er eingin armslongd og kærumøguleikin er burtur. Tað tora vit ikki at viðmæla.

Tað vit í staðin viðmæla er hetta:

Leikarafelag Føroya mælir til at farið verður undir eina vælskipaða, fak- og sakliga tilgongd at tryggja Føroyum eina hóskandi teaturlóg, ið stuðlar upp undir eini menning av føroysku palllistini.

Ein teaturlóg, sum tryggjar at føroysku palllistafólkini kunnu virka fakliga í Føroyum og ikki noyðast at velja Føroyar frá fyri at lívbjarga sær fíggjar- og listaliga.

Eina teaturlóg, sum førir til at føroysk pallist gerst ein týðandi og mennandi partur av tjóðarbygging og samleika okkara. Ein lóg, ið førkar føroyska pallist frameftir og eisini fevnir eitt framtíðar Føroyar við livandi, sterkari skapandi, nýbrótandi føroyskari pallist. Har allir partar av pallistaøkinum, fríyrkirkisleiklistin, áhugaleikurin og stovnurin Tjóðapallur Føroya hava virðirligar karmar, ið hóska til teirra virksemi.

Hesum arbeiði eru vit fús at luttaka í. Vit gleða okkum at frætta frá tykkum.

Vónandi er hetta eisini politiska ynski hjá sitandi landsstýri.

Við leiklistakvøðu.

Tórshavn tann 3. november 2025

Nevndin fyri Leikarkafelag Føroya

Durita Dahl Andreassen, forfólk

Gunnvá Zachariasen, næstforfólk

Marita S. Dalsgaard, verkætlanarleiðari